# Býráðið

**Dagfesting:** 31.08.2023 kl. 19:00
**Málnr.:** 22/00084

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Sonni á Horni, Edva Jacobsen, Gudny Vang, Ólavur Larsen

Varalimir: Leif Andre Eliassen fyri David Andreasen, Sheila Sigurdsdóttir fyri Eivin Breiðaskarð, Kristian Martin Petersen fyri Magna Jøkladal

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 30/23 | 23/00246-12 | Innkalling av Kristian Martin Petersen, Sheilu Sóldal og Leif Andre Eliassen til býráðsfundin 31. august 2023 |
| 31/23 | 21/00266-8 | Umsókn um at víðka parkeringsøkið omanfyri Muntra |
| 32/23 | 23/00297-2 | Uppskot um adressubroytingar á Toftanesvegi |
| 33/23 | 23/00380-2 | Byggiloyvið niðan móti vegnum til goymslu á Bedingini |
| **Til kunning** | | |
| | | |

1

**Til støðutakan**

## 30/23
## 23/00246-12 Innkalling av Kristian Martin Petersen, Sheilu Sóldal og Leif Andre Eliassen til býráðsfundin 31. august 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 31.08.2023 | 30/23 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Býráðnum | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Eivin Breiðaskarð, David Andreassen og Magni Jøkladal hava forfall til býráðsfundin 31. august 2023 kl. 19. Hesir býráðslimir ynskja allir, at varalimir skulu kallast inn sambært § 18, stk. 1. í kommunustýrislógini.<br><br>Kristian Martin Petersen er fjórðvaldur á lista B við 46 atkvøðum, Sheila Sigurdsdóttir Sóldal og Leif Andre Eliassen eru fjórð- og fimtvald við ávikavist 32 og 26 atkvøðum á lista F, í samband við kommunuvalið 10. november 2020.<br><br>Býráðið skal – samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini – fyrst á fundinum 31. august 2023 gera av um treytirnar fyri inkalling av tiltakslimunum Kristian Martin Petersen, Sheilu Sigurdsdóttir Sóldal og Leif Andre Eliassen eru loknar samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | | | |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt**<br>Kommunustýrislógin, kapittul 3.<br>• **Møgulig fylgiskjøl** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Dávur Juul, borgarstjóri mælir til, at Kristian Martin Petersen, Sheila Sigurdsdóttir Sóldal og Leif Andre Eliassen taka sæti í Fuglafjarðar býráð í samband við býráðsfundin 31. august 2023, kl. 19.00. |
| Dagf | 30. august 2023 |

**Býráðið 31. august 2023:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá borgarstjóranum.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## 31/23
## 21/00266-8 Umsókn um at víðka parkeringsøkið omanfyri Muntra

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.08.2023 | 42/23 |
| 2 Býráðið | 31.08.2023 | 31/23 |



### Tilráðing

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Tekniska nevnd | | |
| Stutt lýsing av málinum | Umsókn er komin til Fuglafjarðar kommunu frá Teknistovan Gøta vegna P/F Sandskip um loyvi til at víðka verandi parkeringspláss omanfyri Muntra. Nýggjar tekningar við umsókn fyriliggja í málinum. Parkeringsplássið skal víðkast niðaneftir í stykkið hjá Fuglafjarðar kommunu. Talan er um góðar 2,5m niðan í Fiskastykkið. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Málið hevur verið fyri teknisku nevnd í 2021 við tilmæli um at umsitingin tekur upp samráðingar við umsøkjaran eftir tilmæli frá tekniska leiðara um at verkætlanin verður broytt til at betonggarðurin verður laðaður í staðin fyri. | | |
| Grundarlag | • Telefonnotat av samrøðu við Helga Michelsen frá Tjóðsavninum<br>• Umsókn<br>• Tillagaðar tekningar | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | Til støðutakan | | |
| Dagf | 07.08.2023 | | |

**Tekniska nevnd 17. august 2023:**
Tekniska nevnd metir at økið er ein partur av heildarætlanini um miðbýin og mælir til at umrøða málið í býráðnum.

**Býráðið 31. august 2023:**
Borgarstjórin mælti til at taka punktið av skrá og býráðið tók einmælt undir við hesum.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## 32/23
## 23/00297-2 Uppskot um adressubreytingar á Toftanesvegi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.06.2023 | 34/23 |
| 2 Býráðið | 19.06.2023 | 24/23 |
| 3 Tekniska nevnd | 17.08.2023 | 40/23 |
| 4 Býráðið | 31.08.2023 | 32/23 |

### Tilráðing

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Tekniska nevnd/ býráð | | |
| Stutt lýsing av málinum | Í samband við at íbúðarbyggingin fer í gongd aftur, verður neyðugt at broyta adressunar úti á Toftanesvegi. Uppskot fyriliggur í sakini.<br>Umráðandi er at íbúgvar sum verða ávirkaðir av hesum, fáa boð um ætlaðu broytingarnar. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Bygging á Toftanesvegi | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Uppskot til adressubroytingar | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nei | Nei |
| | Umsitingarligar | Nei | Nei |
| Tilmæli | Til støðutakan | | |
| Dagf | 25.05.2023 | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Tekniska nevnd 08. juni 2023:**
Tekniska nevnd mælir einmælt býráðnum til at fylgja uppskotinum um adressubroytingar, sum er víst á kortskjali. Og at borgarar sum broytingin umfatar, verða kunnaðir áðrenn broytingin fer fram

**Býráðið 19. juni 2023:**
Býráðið samtykti einmælt at koyra málið aftur í nevnd fyri at koma við nýggjum uppskoti um at broyta numrering, soleiðis at verðandi hús fáa 1-tal frammanfyri.

**Tekniska nevnd 17. august 2023:**
Tekniska nevnd fylgir uppskotinum frá býránum um adressubroytingar, soleiðis at verandi hús fáa 1-tal frammanfyri samb. broyttu tekningum

**Býráðið 31. august 2023:**
Býráðið tók einmælt undir við uppskotinum um adressubroytingar á Toftanesvegnum.

7

**33/23**
**23/00380-2 Byggiloyvið niðan móti vegnum til goymslu á Bedingini**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.08.2023 | 41/23 |
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 15.08.2023 | 15/23 |
| 3 Býráðið | 31.08.2023 | 33/23 |

**Tilráðing**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Vinnu- og havnanevndin, tekniska nevnd | | |
| Stutt lýsing av málinum | KJ Hydraulik hevur sent fyrispurning inn til FK um byggiloyvið krevst til at gera skúr niðan móti vegnum á matr. nr 317a har Bedingin er. Tekniski leiðari vísti á at øll bygging yvir 10 kvm skal byggiloyvið til, og annars skal altíð fráboðast til kommununa um annað fer fram av bygging á matrikklum. Eisini so vil tað í hesum førum verða bygt á mark, og at øll bygging í mark krevur fráviksloyvið frá nevndum, í hesum førum vinnu og havnanevndini og teknisku nevnd.<br>Ætlanin er at tann betongveggurin sum er móti vegnum, verður veggurin har tekjan verður fest í. Tekningin hevur ikki mát, men við at máta á kortal.fo, verður byggingin góðar 14m. Byggisamtyktin sigur at um bygging fer fram í mark, kann hon maksimalt verða 12m, um tvær síður verða bygdar í mark. Og longsta mát fyri eina síðu er 8m. Tvs. at í hesum førum, um loyvið verður givið, so skal frávik gevast eisini til longdina í mark, sum er uml. 14m. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | KJ ynskir at gera yvirdekkaða goymslu og arbeiðsrúm sum eisini verður nýtt til sveising og slíping. | | |
| Grundarlag | • Byggisamtikt BK17<br>• Tekning og umsókn | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | Tekniski leiðari vísir á byggisamtyktina hjá Fuglafjarðar kommunu og BK17, um at geva loyvið at byggja í mark, hvar man í báðum førum bert loyvir at byggja 8m sum longsta mát. Eitt annað, sum hugsast skal um, | | |

8

| | |
|---|---|
| | er hvussu KJ kann tryggja at tekjan er trygg, tá ið talan er um at ein kann hoppa niður á tekjuna.<br>Tekniski leiðari mælir til at loyva byggingini í mark, tó at halda seg til 8m, sum byggisamtyktirnar vísa til. Og annars at byggja samb. Byggisamtyktini hjá Fuglafjarðar kommunu og BK17, um bygging í mark.<br><br>**Til býráðsfundin 31. august 2023**<br>Mælt verður býráðnum at taka støðu til niðurstøðuna hjá Vinnu- og havnanevndini 15.08.2023 og Teknisku nevnd 17.08.2023 um at gera frávik í byggisamtyktini og loyva umsóknini frá KJ hydraulik. |
| Dagf | 07.08.2023 |

**Vinnu- og havnanevndin 15. august 2023:**
Vinnu- og havnanevndin fylgir tilmælinum frá tekniska leiðara, tó at loyva byggingini samb. tekningum. Eisini at tekjan, í longd, má fylgja veghæddini.



**Tekniska nevnd 17. august 2023:**
Tekniska nevnd fylgir tilmælinum frá vinnu- og havnanevndini um at loyva byggingini samb. tekningunum. Orsøkin til at frávik verður givið á meira enn 8m, er tí at byggingin er undir veghædd, ikki ávirkar útsýnið, er ikki lukka rúm og ein betran fyri heildarøkið.

**Býráðið 31. august 2023:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælunum frá Vinnu- og havnanevndini og Teknisku nevnd við tí treyt at taki verður konstruerað soleiðis at tað tolir ein ávísa vekt um onkur skuldi funnið uppá at lopið á takið.

Fundurin lokin kl. 19.30

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

Sonni á Horni

Edva Jacobsen

Gudny Vang

Ólavur Larsen

Leif Andre Eliassen

Sheila Sigurdsdóttir Sóldal

Kristian Martin Petersen